Óhugnaligur tilburður á Danmarkarferð

76 ára gamla Petra Hansen úr Klaksvík fór í apríl mánaða niður til Danmarkar at vitja dóttrina. Tað, sum skuldi havt verið ein avslappandi túrur, bleiv ístaðin til ein túr, sum hon ongantíð fer at gloyma. Áðrenn hon vardi nakað, stóð ein ungur maður uppi yvir songini hjá henni við knívi og bað um taskuna

INNBROT
Solby A. Eliasen

- Um ikki pensionistakortið lá í taskuni, so hevði hon so avgjørt ikki komið aftur, halda bæði Petra og Signy

Klaksvík: Tá Sosialurin kemur á vitjan hjá Petru hendan morgunin, er dóttir Petru Signy eisini har. Eg verði boðin inn í stovuna til ein kaffimunn. Ein sera hugnalig og fjálg stova. Og vit práta um leyst og fast, áðrenn vit byrja at práta um óhugnaliga tilburðin, sum Petra var úti fyri í Esbjerg.

Petra Hansen var í Esbjerg og vitjaði dóttrina og familjuna hjá henni. Tey búgva í einum sera friðarligum kvarteri.

Petra sigur, at dóttirin segði við hana, at har var so friðarligt, at henni nýttist ikki at stúra fyri nøkrum har.

- Tá segði eg við hana, at tað er júst í slíkum støðum, har ein ikki væntar tað, at tílíkt hendir. So eg veit ikki, um eg havi havt eina kenslu av, at okkurt fór at henda, sigur Petra.

Hon hevði verið niðri í umleið eina viku, tá tilburðurin fór fram.

Dóttirin og maðurin fóru til arbeiðis. Petra nýtti so høvi til at leggja seg aftur eina løtu. Alt húsið var læst, men eitt lítið vindeyga stóð á glopp, og tann vegin er innbrotsmaðurin komin inn.

- Eg visti ikki av nøkrum, fyrr enn hann stóð uppi yvir mær við knívi, greiðir Petra frá.

Tað einasta hann segði var: »Giv mig dine penge og piller«!!

Petra bleiv sjálvsagt sera bangin, men var so mikið rólig kortini, at hon bara rætti honum taskuna hjá sær. Hvat síðani hendi, er eitt sindur óklárt í minninum hjá Petru. Hon var sjálvsagt so skelkað, men hon minnist eitt ella annað um, at hon fekk eitt skump, so hon datt og smekkaði høvdið í.

- Eg minnist ikki rættiliga, hvat hendi aftan á, at eg hevði givið honum taskuna, men eg minnist, at eg, tá eg kom fyri meg aftur, fór út beinanvegin at leita eftir hjálp, greiðir Petra frá.

Tað sást týðuliga, at hon ikki heilt er komin yvir tilburðin enn.

Tvey tey fyrstu húsini, sum hon kom til vóru bæði læst, men í tí triðja vóru fólk í ferð við at flyta inn.

- Tað var ein ung kona, sum hjálpti mær inn og gav mær vatn og kaffi at drekka. Avbera fitt og hjálpsom.

Har frá bleiv so ringt eftir løgregluni og eftir dóttrini hjá Petru.

Petra greiðir frá, at hon ikki heilt minnist alt, sum hendi undir tilburðinum. Hon dugdi ikki at siga nágreiniliga, hvussu maðurin, sum breyt inn, sá út.

- Eg segði also við løgregluna, at eg lá ikki har og eygleiddi mannin. Tað einasta eg sá, var tann blanki knívurin, sum hann helt frammanfyri mær, sigur Petra.

Men eitt ella annað er so hent við Petru, tí á skaðastovuni løgdu tey til merkis, at hon hevði eina stóra kúlu á høvdinum.

- Eg veit ikki rættiliga, hvussu eg havi fingið hana, men eg haldi, at hann koyrdi undir meg, áðrenn hann fór avstað, soleiðis at eg fór um koll og smekkaði høvdið í ein borðkant, men eg minnist ikki ordiliga, greiðir Petra frá.

Aftan á tilburðin, sum hendi ein mikudag, var Petra ongantíð einsamøll inni, inntil hon fór heimaftur mánadagin aftaná aftur.

Taskan kom afturíaftur

Taskan, sum Petra gav hesum innbrotstjóvi, bleiv funnin aftur í einum skógi í Esbjerg. Í henni lá pensionistakortið hjá Petru og ein lyklaringur við úthurðslyklinum í.

- Eg var so hørm um handan lyklaringin, tí maður mín, Gullak, átti hann, so eg eri so glað fyri, at hann lá í taskuni, sigur Petra við einum lítlum smíli.

Hon hevði tíbetur tikið bæði ferðaseðil og pass úr taskuni, so tað bleiv ikki burtur. Men tveir pungar og ein sparikassabók eru vekk.

Men tað ger minni, heldur Petra, sum er greið yvir, at hon var sera heppin at sleppa so væl frá hendingini.

Signy, dóttirin, sum bert hevur sitið og lurtað, meðan Petra hevur greitt frá, skoytir her upp í, at tey her heima sjálvsagt fingu boð um tilburðin beinanvegin, og at Petra hevði tað gott.

- Men vit vóru sjálvandi øgiliga kløkk, sigur hon.

Signy leggur aftur at, at tað fyrsta Petra segði, tá hon kom inn aftur til sín sjálvs var, at hon fór aldrin avstað aftur ein túr nakrastaðni.

- Men nú fáa vit at síggja. Mamma má fyrst og fremst koma ordiliga fyri seg, og kunna leggja handan óhugnaliga tilburðin aftur um seg, so fáa vit at síggja, sigur Signy.

Bilur útav

Mánakvøldið fór ein bilur út av vegnum niðan á Háls í Klaksvík. Bilførarin var ein 72 ára gamal maður. Bilurin rullaði tvær ferðir runt, áðrenn hann steðgaði við ein stein

ÓHAPP
Solby A. Eliasen

Klaksvík: Av politistøðini í Klaksvík frætta vit, at maðurin helst fekk eitt dánilsi, meðan hann koyrdi, og sneiddi so oman av vegnum. Bilurin fór á rull og rullaði tvær ferðir runt, áðrenn hann steðgaði við ein stein, sum var har. Tað var sera heppið, at bilurin rakti steinin, tí ongin annar steinur er har í nánd, so um hann hevði farið við síðuna av, kann roknast við, at bilurin hevði rullað einar fimti metrar afturat.

Maðurin raknaði við aftur, tá bilurin fór á rull, og hann slapp sær út úr bilinum, tá hann var steðgaður og gekk niðan aftur á vegin sjálvur. Maðurin hevði fingið skaða í høvdið. Talan var um eina 20 sentimetrar langa skeinu um skallan heilt inn í kraniu. Hann bløddi sera illa, og tað er sera vandamikið - serliga tá hugsað verður um, at maðurin er hjartasjúklingur. Og tað at hann er hjartasjúklingur er eisini orsøkin til, at maðurin ikki sat í trygdarbelti. Hjartasjúklingar kunnu fáa eitt skrivligt, góðkent undantaksloyvi, um tey so skulu hava við sær í bil, um at tey kunnu sleppa frá at sita í trygdarbelti.

Men ikki kann annað sigast enn, at eydnan rættiliga var við hesum manninum henda dagin. Um tríhundrað metrar longri niðri var ein bilur komin koyrandi. Bilførarin ætlaði at venda, tí hann tímdi ikki at koyra heilt niðan á Háls. Hann sá tilburðin og koyrdi niðan til mannin og fekk hann á sjúkrahúsið.

Bilurin, sum fór útav, gjørdist vrak.

Bilurin rullaði bert tvær ferðir runt, men um ikki hann rakti steinin, sum stóðr har, so hevði hann óivað rullað einar fimti metrar afturat

Sløkkiliðið boðsent til Hotel Norð

Sløkkiliðið í Klaksvík fekk týsnáttina fráboðan um, at eldur var í Hotel Norð á Viðareiði.

Sløkkiliðsmenninir vóru skjótir til Viðareiðis og kundu beinanvegin staðfesta, at talan tíbetur bert var um nógvan royk. Eldur var ikki í hotellinum. Orsøkin til tann nógva roykin, var ein grýta við kjøti, sum varð gloymd.

Gestirnir á hotellinum høvdu sjálvandi fingið boð um at fara út úr hotellinum og fingu onkrir av teimum nakrar myndir, tá bilarnir hjá Sløkkiliðnum komu blinkandi norðureftir.

- sae -

Vestnorden i fokus:

Byrjaði við Føroyar í fokus

Jógvan Hugo Gardar er formaður í Norsk-færoysk lag, og er hann eisini ein av fyrireikarunum til Vestnorden i fokus
Mynd: Finnur Justinussen

Í heyst verður skipað fyri stórum útnorður tiltaki í Oslo, sum eitur Vestnorden i fokus. Tiltakið varðar í eini 18 dagar, og verða Noreg, Ísland og Føroyar saman við Grønlandi miðpunktið

TILTAK
Ingrid Bjarnastein

– Alt byrjaði við, at Norðurlandaráðið í Oslo setti seg í samband við okkum í Norsk-færoysk lag, fyri at skipa fyri einum tiltaki, ið skuldi eita Føroyar í fokus, sigur Jógvan Hugo Gardar, sum er formaður í Norsk-færoysk lag og ein av fyriskiparunum til Vestnorden i fokus.

– Men so við og við, sum fyrireikingarnar fóru í gongd, valdu vit at taka øll londini í útnorði við, tí tá alt kemur til alt, so eru nógvir felagsnevnarar fyri øll londini. So vit hava valt, at lýsa øll trý samfeløgini, greiðir Jógvan Hugo frá.

Tiltakið byrjar tann 1. oktober og heldur fram til umleið 18. oktober. Síðani verður eitt felags norðurlendskt tiltak sum fevnir um tíggju dagar.

Nógv verður gjørt burturúr í heyst, tí tá fyllir Norðurlandaráðið eisini 50 ár, og roynt verður at fáa so nógv við sum møguligt, bæði mentan og politikk.

Føroyingar

Endamálið við tiltakinum er at vísa fram eitt sindur av tí, sum eyðkennir londini í útnorði. Her verður kastað ljós á mentan, ferðavinnu, mál, søgu, dagins samfelag, politikk og so framvegis. Millum annað verður skipað fyri temakvøldum har fyrilestrar verða hildnir og tey ymsu londini verða lýst.

Ljóskastarin verður eisini vendur ímóti tí føroyska tónleikinum. Clickhaze og Týr skulu spæla, helst í Blá í Oslo, og møguliga fara hesir báðir bólkarnir eisini at spæla aðrastaðni í Noregi og eisini í Svoríki.

Eisini verður Havnarkórið við í Oslo.

– Um ætlanin hjá teimum heldur, og um tey fáa figgja ferðina, so er ætlanin, at kórið fer fyrst til Helsingfors og Stockholm, og endar síðani í Oslo, sigur Jógvan Hugo Gardar.

Tiltakið Vestnorden i fokus byrjar tann 1. oktober og endar 18. oktober.

Veðrið Bilar Lýsingar Tíðindi Viðmerkingar Ítróttur Nøvn Skráir Tiltøk Sosialurin
veitst tú ikki tað?
Sosialurin

Hjá okkum situr tú væl

Leður | Luft

Rúmligt, fjálgt og hugnaligt. Betri pláss til beinini og setur úr leðri í øllum flogfarinum. Atlantic Airways hevur enn einaferð gjørt tað høgligari at flúgva.

Vit hava innrættað kabinuna av nýggjum og tikið eina stólarekkju úr, so tað er vorðið munandi meiri rúmsátt hjá okkara ferðafólki. Vit hava eisini skift allar teir gomlu stólarnar út við fjálg leðursetur, so øll flúgva á fyrsta klassa hjá okkum.

Inni hjá okkum situr tú væl, meðan skipari og manning syrgja fyri, at tú fært ein góðan túr.

ATLANTIC AIRWAYS
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01
www.atlantic.fo